## Lækni mælir til fría sølu

Økislæknin í Qaanaaq í Grønlandi, Hans Thorsøe, heldur, at tað var púra burturvið av landsstýrinum at steðga allari rúsdrekkasølu í bygdini, tí ein frágreiðing hevði avdúkað, at fólk har drukku so illa. Við útvarpið í Nuuk sigur læknin, at fólk í Qaanaaq drekka ikki verri enn aðrir grønlendingar, og hann mælir myndugleikunum til at skipa fría rúsdrekkasølu. So slepst undan, at fólk drekka heimabryggj og tað, ið verri er, sigur hann.



## Seinkingar í Keflavík

Tað gongur ikki nóg væl at avgreiða ferðamannaflogførini, sum flúgva upp á altjóða floghavnina í Keflavík í Íslandi, skrivar Morgunblaðið. Blaðið veit at siga, at í seinastuni hava fleiri flogfør verið seinkað, tí trupulleikar hava verið, tá trappurnar hjá floghavnini skulu knýtast at flogførum, ið hava lent. Leiðslan ásannar trupulleikarnar, men sigur, at herd trygdarkrøv taka longri tíð, samstundis sum altsamt fleiri ferðast um floghavnina.

# Serskattaskipan til servitan

**Á skattliga økinum mælir arbeiðsbókurin, ið hevur viðgjørt kunningartøkni í Visjón 2015, til serligar skattaskipanir til fólk við serligari vitan innan KT**

VISJÓN 2015

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Landsstýrismenninir »på rad og række« til handanina. Allir vara av hvør sínum øki í sambandi við tey tilmæli, ymsu strategibólkarnir leggja fram*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

At kunningartøkni er ein av grundsteinunum, sum Visjón 2015 skal byggja á, kann ikki koma óvart á nakran. Júst hendan vinnan er ein hin skjótast vaksandi og skjótast menta vinnan seinastu árini.

Tí verður alneyðugt hjá Føroyum sum framkomið samfelag at vera í fremstu røð, hvat hesum viðvíkur.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur stungið út í kortið, hvussu vit menna hesa vinnu, hevur fleiri ítøkilig tilmæli um hetta. Og fleiri teirra rættiliga kollveltandi. Ikki minst tilmælið um, at serlig skattaskipan verður gjørd fyri fólk, við serligari vitan innan kunningartøkni.

Í frágreiðingini verður sagt:

»Skattareglurnar viðvíkjandi vællærdum skulu veðra eins lagaligar og í okkara grannalondum (serskattaskipan til fólk við servitan). Eisini skulu lagaligar skipanir gerast til útlendskar, hátøkniligar fyritøkur, sum seta deildir á stovn her. Nyttan er, at vit skapa vitanartung arbeiðspláss beinleiðis og óbeinleiðis í undirveitaravinnu og avleiddari vinnu. Við hesum verða Føroyar eins væl sæddar og onnur Norðurlond, tá talan er um alheimsgerð av vinnulívi og mentan, breiðbandsnýtslu og lutfalsliga nóg nógv vinanartung arbeiðspláss og tílíkt«

Arbeiðsbólkurin mælir til, at hetta verður framt í verki innan 2009. Eisini verður roknað við, at inntøkurnar av hesum fara at verða størri enn útreiðslurnar, tí menniskjaliga tilfeingið verður víðkað og virksemið í vitanartungum vinnum verður økt.

### Inn í skúlarnar

KT-arbeiðsbólkurin mælir tískil til størri og fleiri stig til tess at fremja málið um øktar førleikar til ungfólk at virka í vinnukrevjandi vinnum.

»Útbúgvingarstøðið er ein týðandi táttur í at menna og gagnnýta kunningartøkni í Føroyum«, verður sagt í frágreiðingini. Í tí sambandi verður beinleiðis mælt til:

- í minsta lagi 12 ára skúlagongd
- dagligt samstarv við útlendskar lærustovnar á øllum økjum – til dømis við vinaflokkaskipan millum føroyskar og útlendskar skúlar – við felags undirvísing
- størri dentur skal leggjast á at býta næmingar upp eftir førleika
- enska málið skal raðfestast eins frammaliga og móðurmálið
- fyritreytir verða skaptar fyri at seta á stovn og reka altjóða skúla í Føroyum.

Skal hetta fremjast í verki er neyðugt, at lærarahópurin verður grundleggjandi broyttur eins og undirvísingarskipanin má tillagast. Tí skulu fólk við høgum og fjøltáttaðum útbúgvingum sleppa framat í skúlunum.

Men hetta fer at kosta, tí »hægri førleiki og hægri løn hanga saman«, verður staðfest av arbeiðsbólkinum sum kortini metir, at hetta fer at koma føroyska undirvísingarverkinum og harvið samfelagnum tilgóða í longra enda.



*Fleiri politikarar vóru til handanina. Teirra millum Høgni Hoydal, floksformaður*

*Mynd: Jens Kristian Vang*